


*Landsstýriskvinnan í Mentamálum, Annita á Fríðriksmørk vil beina allar málsligar forðingar av vegum, tá føroyingar fara út um landoddarnar í útbúgvingarørindinum. Hetta skal millum annað gerast við einum ókeypis málskeiði*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Málið skal ikki verða nøkur forðing

**Landsstýriskvinnan í mentamálum, Annita á Fríðriksmørk vil beina allar málsligar forðingar av vegum, tá føroyingar fara út um landoddarnar í útbúgvingarørindinum. Fyri at økja um talið á teimum, sum velja onnur lond enn Danmark og enskt talandi lond, at útbúgva seg í, verður møguleiki at fáa eitt ókeypis málskeið í framtíðini**

MARKLEYS ÚTBÚGVING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Vit skulu hava fleiri fólk, ið útbúgva seg aðrastaðni enn í Danmark og enskt talandi londunum. Hetta er greiði boðskapurin frá landsstýriskvinnuni í mentamálum, Annita á Fríðriksmørk.

Ein stór forðing hjá lestrarhugaðum føroyingum at velja onnur lond enn eitt nú Danmark ella Ongalnd er málið. Ein setist aftur, tí ein er ótryggur við onnur mál enn danskt og enskt, og tað kann verða ein forðing fyri at fáa so gott úrslit sum gjørligt. Hetta ætlar landsstýriskvinnan í mentamálum, Annita á Fríðriksmørk, at gera nakað við.

### Forðing burtur

Í framtíðini fara føroyingar, sum velja útbúgvingar í øðrum londum enn Danmark og enskt talandi londunum, at fáa eitt ókeypis málskeið, áðrenn farið verður undir sjálva útbúgvingina. Við hesum, er málið frá politiskari síðu at beina fyri málsligu forðingini.

Holger Arnbjerg, ið starvast á Altjóða Skrivstovuni fegnaðist ætlanina hjá landsstýriskvinnuni.

– Í dag búgva 92-93% av øllum lesandi í Danmark ella einum enskt talandi landi. Einstøk eru í Spania, Italia, Kina, Kuba, Fraklandi og Týsklandi, men hetta tal kundi verið størri. Innan eitt nú ferðavinnuna í Føroyum skríggja tey eftir fólki, sum duga týskt, franskt og spanskt, og tað er at gleðast um, at man frá politiskari síðu vil gera nakað fyri, at fólk eisini velja hesi lond at útbúgva seg í, segði Holger Arnbjerg millum annað.

Annita á Fríðriksmørk sigur, at hon heldur tað er ómetaliga týdningarmikið, at føroyingar leita sær útbúgving í so ymiskum londum sum gjørligt. Hetta tryggjar neyðuga fjølbroytni í samansetingini av teimum ymisku útbúgvingunum. Hon vísir millum annað til, at føroyingar í dag samskifta við ein hópin av ymiskum londum, og tað er avgjørt ein styrki, at vit hava fólk sum kenna til mentan og mál hjá teimum londum, vit samskipa við.

### Byrjar í dag

Í dag fer útbúgvingarstevnan, Markleys útbúgving, av bakkastokki í Norðurlandahúsinum. Endamálið við stevnuni er at kunna um óteljandi útbúgvingarmøguleikarnar úti í heimi.

Heitið Markleys útbúgving sipar til, at tíðar- og staðbindandi mørkini fyri at taka eina útbúgving eru ikki so týdningarmikil longur sum fyrr. Útbúgvingarstevnan skal verða við til at eggja bæði yngri og eldri at fáa nýggj hugskot til nýggjar avbjóðingr á teirra útbúgvingar- og lívsleið.

Markleys útbúgving verður bæði fríggjadagin og leygardagin í Norðurlandahúsinum og ùtvarpshøllini.



*Holger Arnbjerg er primus motor aftanfyri útbúgvingarstevnuna, Markleys útbúgving, sum fer av bakkastokki í dag.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Nývval á trappuni



*Hørðu krøvini hjá Høgna Hoydal og Tjóðveldisflokkinum til Fólkaflokkin kunnu føra til, at Edmund Joensen fær eitt skjal frá løgmanni, har hann útskrivar nýval*
*Mynd: Jens K. Vang*

**Fólkaflokkurin bakkar ikki ein tumma, og tí líkist alt meira og meira einum nýggjársvali um góðar seks vikur. Løgmaður vil ikki vátta, at hann spælir sær við tankanum, men hann viðgongur, at tað kann ganga skjótt í politikki. Ein umbering er óhugsandi**

NÝVAL
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Løgmaður boyggir seg ikki. Og tað kemur heldur ikki upp á tal, at Fólkaflokkurin skrivar undir nakra av treytunum, sum Tjóðveldisflokkurin hevur sett.

So mikið tyktist greitt fyrrapartin hósdagin. Landið alt lá annars í spentari bíðistøðu eftir, hvat løgmaður og Fólkaflokkurin fóru at gera. Fólkaflokkurin viðgjørdi støðuna á fleiri fundum, og løgmaður hevur fingið fullan stuðul millum partamenninar á løgtingi og í landsstýri.

Anfinn Kallsberg vil hvørki vátta ella avsanna upplýsingarnar hjá Sosialinum um, at hann ikki vil ganga undir nakra av treytunum, sum eru settir fram av Tjoðveldisflokkinum. Greitt er, at fleiri fólkafloksfólk hava ávarað hann um at koma við nakrari umbering, og eingin vil hoyra talan um, at onkur annar verður løgmaður í samgonguni.

### Nýval sannlíkt

Tað ljóðar annars, at hann var hugaður at geva eina veika umbering, men av ótta fyri at hann samstundis setir seg sjálvan í ringt ljós, tí hann sostatt viðgongur at hava misbrúkt sítt embæti, so hevur hann slept tí møguleikanum.

Sostatt bendir nógv á, at nýval er um at gerast tann mest sannlíki útgangurin á stjórnarkreppuni, sum hevur tikið seg upp, eftir at bókin »Skjót journalistin« er útkomin. Løgmaður hevur fullan rætt at skriva út nývval, tá hann heldur tað vera rætt, og tað kann eins væl henda í dag sum í morgin.

– Politikkur er ein vandamikil verð. Tá ið tingini henda, so henda tey skjótt, men annars havi eg onga viðmerking til tínar metingar, sigur Anfinn Kallsberg løgmaður.

Hann vísir bara til stýrisskipanarlógina, sum hann hevur liggjandi framman fyri sær á skrivaraborðinum í Løgmansskrivstovuni í Tinganesi. Sambært henni vísa seg tríggir upplagdir møguleikar, um eitt val gerst úrslitið av fastlæstu støðuni.

### Tríggir møguleikar

Løgmaður kann sjálvur skriva út nýval. Tað ger hann við at handa løgtingsformanninum eitt skriv og lýsa eina kunngerð. So er løgtingsval um seks vikur. Keldur í Fólkaflokkinum siga tó við Sosialin, at løgmaður helst himprast við hendan møguleikan, tí so eru tað hansara persónligu viðurskifti, sum hava útloyst eitt val.

Í staðin kann Fólkaflokkurin so leggja uppskot fyri løgtingið um eitt nýval. Tað gevur eisini flokkinum møguleikan at fáa eitt rokmikið kjak fyri opnari mikrofon – a la misálitið á Jørgen Niclasen – har flokkurin fær vart síni sjónarmið, uttan at pressan klippir og kutar í útsagnum.

Triðji møguleikin er, at eitt misálit verður reist. Tað skal eisini viðgerast í løgtinginum. Innan eina viku eftir misálitisuppskotið er samtykt, hevur løgmaður møguleikan at útskriva valið.

Sostatt hevur løgmaður stórt vald at avgera, hvussu landið liggur. Tað er gjørt fyri at hava javnvág millum útinnandi og lóggevandi valið.

### Politiskt vaakum

Góðar keldur siga annars, at tað er merkiliga friðarligt á politiska vígvøllinum, hóast nógv stendur á. Tað kann vera ein fráboðan um ódnina, sum kemur. Eitt sindur av sambandi hevur verið tvørtur um floksmørk, men tað hevur einki úrslit givið.

Sosialurin veit, at Fólkaflokkurin stillisliga hevur spurt seg fyri hjá Javnaðarflokkinum. Teir droyma um eina minnilutastjórn, tryggjað av smáu flokkunum, sum eisini hevur tiltalað javnaðarfólk. Men Javnaðarflokkurin aftrar seg við at bjarga løgmanni. Okkurt óformligt samband hevur eisini verið millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin, men har er ikki so nógv at tosa um, tí Tjóðveldisflokkurin hevur sett so harðar treytir, sum eru ringar at víkja frá.

Spurningurin er, hvat Tjóðveldisflokkurin ger, um einki hendir. Tað ljóðar, at eitt evstamark verður ásett, men tað fekst ikki svar uppá, áðrenn blaðið fór til prent.

## Einki persónligt fyri Anfinn

**Anfinn Kallsberg tekur tað ikki so tungt, at tað leikar hart á hann í hesum døgum. Málið er politiskt, sigur hann, og sjálvur hevur hann lagt tað aftur um seg. Hann finst harðliga at pressuni fyri at siga, at hann sjálvur mátti rinda peningin aftur á sinni**

BÓKHALDARIN
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

– Tað er fullkomiliga hol í høvdið, tá sagt verður, at eg persónliga skuldi rinda peningin aftur. Eg havi ikki persónliga goldið hasar 912.000 krónurnar aftur. Tað vóru skipini, sum eg var reiðari á, sum endurgoldu peningin aftur til Frostvirkið.

Tað sigur Anfinn Kallsberg, sum er troyttur av at hoyra, at hann skuldi rinda pengarnar aftur til Frostvirkið á sinni.

Hann vísir staðiliga aftur, at hann fekk nakað persónliga burturúr tí, sum hendi fyri góðum 20 árum síðan, tá ið hann var tikin í at hava svikað fyri 912.000 krónur sum bókhaldari á Frostvirkinum. Talan var um flytingar millum virki og skip, sum hingu saman, sigur hann, og semjan millum Frostvirkið og Anfinn Kallsberg, sum grannskoðarin legði upp til, fingu flytingarnar at ganga aftur.

– Anfinn Kallsberg hevur einki fingið burturúr hasum, og tí hevur hann heldur einki goldið aftur persónliga. Tað gjørdu skipini, sigur Anfinn Kallsberg.

Tað sæst annars ikki á løgmanni, at hann er á hvørjum munni í hesum døgum. Sjálvur sigur hann, at tað nervar hann ikki stórvegis.

– Eg havi tað gott. Sjálvandi er trýstið stórt, og tað stendur nógv á. Men hetta málið er langt síðan avgreitt fyri mítt viðkomandi, og tað, sum nú fyrigongur, er politiskt trýst. Tað havi eg upplivað áður, sigur Anfinn Kallsberg.